


www.oljan.fo

**Jan Müller** 04 - 12 - 2011

# Oljan kann fara upp í 250 dollarar

Gera ES og USA álvara av teimum búskaparligu tiltøkunum, sum tey ætla at seta í verk ímóti Iran, kann tað gera, at oljuprísurin á heimsmarknaðinum fer upp í einar 250 dollarar fyri tunnuna. Hendan álvarssama ávaringin kemur frá formanninum í vinnunevndini hjá iranska tjóðartinginum, Arsalan Fathipour. Í síðstu viku samtyktu uttanríkisráðharrarnir í ES-londunum at banna øllum samhandli við 180 fyritøkur og einstaklingar í Iran, og samstundis ávaraðu teir um, at tað kann koma upp á tal at steðga øllum samhandli við iransk fíggjar- og oljufeløg. At Arsalan Fathipour nevnir USA í hesum viðfangi kemst av, at Kongressin í Washington umhugsar eina lóg, sum skal steðga øllum samskifti við iranska tjóðbankan, sum umsitur allan oljuhandilin við umheimin. Tá marknaðurin í New York lat aftur fríggjakvøldið, var prísurin á ráolju 100,96 dollarar fyri tunnuna, meðan Brent-oljan kostaði 109,94 dollarar á marknaðinum í London.